## Eisini flóðaldur í Miðjarðarhavinum

Tað eru ikki bara londini í Asia, sum verða rakt av tsunami-flóðaldum. Tað hendir eisini í Miðjarðarhavinum av og á.

Á jarðfrøðistovninum í Grikkalandi siga tey, at tað eru umleið 60 ár ímillum tær stóru flóðaldurnar í Egearahavinum, men at tað eru bara 15 ár ímillum tær smáu flóðaldurnar. Eru upplýsingarnar rættar, verður Egearahavið rakt av einari flóðaldu um ellivu ár, skrivar DPA.

Tann seinasta stóra flóðaldan var í Egearahavinum í 1956, og hon kravdi næstan 60 mannalív á Kyklade-oyggjunum. Fólk á staðnum, sum sluppu undan flóðalduni á lívi, vildu vera við, at hon var umleið 20 metrar høg. Grikskir jarðfrøðingar komu eftir, at flóðaldan stóðst av einum jarðskjálvta undir havbotninum í Egearahavinum. Hann var 7,8 á Richter-stiganum.

## Stórt avlop

Hóast týski búskapurin er í trupulleikum, vísa nýggj tøl, at týski útflutningurin hevur so stóra framgongd sum sjáldan fyrr.

Í tíðarskeiðinum frá januar til november í fjør hevði Týskland 155,6 milliardir evrur ella 1,1 billión krónur í avlopi á handilsjavnanum, og tað var heili 10 prosent meiri enn í sama tíðarskeiði árið fyri. Sambært tølunum keyptu hini ES-londini týskar vørur og tænastur fyri 3,5 billiónir krónur í fjør, meðan týski innflutningurin úr hinum ES-londunum var 2,8 billiónir krónur.

Danmark hevur havt stóran samhandil við Týskland, men tey seinastu árini er handilin minkaður. Í fjør keyptu danir týskar vørur og tænastur fyri góðar 69 milliardir krónur, meðan týski innflutningurin úr Danmark var góðar 57 milliardir krónur. Tað var næstan tvey prosent minni enn í 2003, skrivar Berlingske Tidende.

## Bøtur hjálpa ikki

Kanningar hjá norsku vegamyndugleikunum vísa, at umleið helmingurin av bilunum koyra skjótari, enn teir hava loyvi til.

Samstundis vísa kanningarnar, at tað hevur havt lítla og onga ávirkan havt á bilførararnar, at myndugleikarnir hava hækkað bøturnar fyri at koyra ov skjótt. Egil Otter, sum hevur gjørt kanningarnar, sigur við Bergens Tidende, at tað er hugstoytt, at politikararnir bara lata standa til. Men ein orsøk er kanska, at tær stóru bøturnar koma ríkiskassanum væl við.

Sambært Bergens Tidende eru ferðslubøturnar í Noregi munandi størri enn í øðrum londum. Egil Otter sigur við blaðið, at tað hevði verið munandi betur, um løgreglan vísti seg meiri á vegunum, tí eftir hansara tykki vísa royndirnar, at bøtur loysa ikki trupulleikarnar við ov nógvari ferð.

Í samferðslumálaráðnum hava tey eina aðra áskoðan. Har ivast tey ikki í, at tær stóru bøturnar hóast alt hava sína ávirkan.

## Stór framgongd

Tað gongur við rúkandi ferð hjá svensk-japonsku telefyritøkuni Sony Ericsson.

Tríggjar teir seinastu mánaðarnar í fjør seldi fyritøkan ikki færri enn12,6 milliónir fartelefonir, og tað var heili 56 prosent fleiri enn somu máaðir í 2003. Fyritøkan sigur, at samanumtikið var sølan í fjør 40 prosent størri enn í fyrraárið. Tað eru serliga fartelefonirnar við myndatóli og tær sokallaðu UMTS-fartelefonirnar, sum eru væl umtóktar. Skipanin í UMTS-fartelefonunum ger tað møguligt at senda stórar mongdir av data sum t. d. videoupptøkur ígjøgnum fartelefon.

Hóast ta stóru framgongdina var avlopið hjá Sony Ericsson bara umleið ein milliard krónur í oktoberársfjórðingi. Tað var minni, enn serfrøðingar høvdu væntað, og tað hevði við sær, at virðið á partabrøvunum í fyritøkuni fall eitt sindur. Mett verður, at umleið sjey prosent av øllum nýggjum fartelefonum eru av slagnum Sony Ericsson.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Vænta at finna 60.000 lík afturat



*Myndugleikarnir vænta at finna umleið 60.000 lik afturat í Aceh-landspartinum, sum fór serliga illa annan jóladag*

**Indonesisku myndugleikarnir halda, at flóðalduvanlukkan kann hava kravt 150.000 mannalív í landspartinum Aceh**

FLÓÐALDAN

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Nógv bendir á, at talið av deyðum aftan á flóðalduna í Indiska Havinum annan jóladag er nógv størri enn higartil hildið.

Serliga indonesiski landsparturin Aceh fór illa av jarðskjálvtanum og flóðalduni. Higartil hava myndugleikarnir skrásett, at 89.832 fólk doyðu av vanlukkuni har, men í gjár segði ein embætismaður, at tað veruliga talið er helst nógv størri.

– Vit halda, at umleið 150.000 fólk doyðu her, segði Haniff Asmara, sum samskipar tað almenna hjálpararbeiði í Aceh. Hann segði seg vænta, at bjargingarliðini fara at finna umleið 60.000 lík afturat, og at hetta arbeiðið fer at taka einar fýra vikur afturat.

Indonesisku myndugleikarnir hava fyrr sagt, at jarðskjálvtin og flóðaldan kravdu 114.717 mannalív í Indonesia, men nú koma kanska eini 60.000 afturat, skrivar Reuters.

# Abramovitsj ákærdur fyri svik

**Rusiski ríkmaðurin, sum millum annað eigur enska fótbóltsfelagið Chelsea, skal nú fyri rættin í Sveis, har hann er ákærdur fyri svik**

RÆTTARMÁL

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Evropeiski menningarbankin EBRD hevur lagt sak ímóti Roman Ibramovitsj við kravi um, at hann skal rinda bankanum slakar 100 milliónir krónur. Tann ovurríki russin sigur seg vera ósekan og hevur sýtt fyri at gjalda.

Málið byrjaði, tá russiski bankin SPS-Agro fór av knóranum í 1998. Bankin hevði tikið lán í evropeiska menningarbankanum, men var ikki førur fyri at rinda tað aftur. Ístaðin fyri yvirtók menningarbankin eitt tilsvarandi lán frá svetsisku fyritøkuni Runicom. Tað vísti seg, at hetta var eitt felag, sum Roman Abramovitsj átti, og sum hann brúkti sum millumlið í sínari oljusølu fyri at sleppa undan at gjalda skatt. Seinni hevur sveitsiska fyritøkan sýtt fyri at rinda menningarbankanum lánið, tí fyritøkan vil vera við, at hon hevur goldið einum triðja banka peningin. Men menningarbankin heldur uppá, at hetta er ikki so, og at skjølini í sambandi við hesa afturgjaldingina eru falsað. Fyri tveimum árum síðani fekk menningarbankin viðhald, men tá hann skuldi krevja pengarnar frá sveitsiska felagnum, var tað farið av knóranum og ognirnar fluttar til eitt nýtt felag, sum er skrásett í Gibraltar.

– Í Russlandi hevði Roman Abramovitsj kanska sloppið burtur úr hesum, men soleiðis er tað ikki í Sveits, sigur leiðslan í evropeiska menningarbankanum við BBC.

BBC vil vera við, at Abramovitsj breyt sveitsiska lóg við at tøma fyritøku sína har og við at falsa skjøl. Nú skal hann so svara fyri seg.